# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Petra Viderø Johannesen:

## 30 ára starvsdag á Advokatskrivstovuni

Fríggjadagin 5. januar 2007 hevði Petra Viderø Johannesen, advokatskrivari, 30 ára starvsdag hjá Advokatskrivstovuni í Fr. Petersensgøtu í Havn.

Petra vaks upp á Viðareiði og fór eftir barnaskúlan til Havnar í realskúla.

Hon byrjaði sum skrivstovunæmingur á Advokatskrivstovuni í 1977 og hevur síðani tikið útbúgving sum advokatskrivari.

Petra er elst av teimum fýra børnunum hjá Daisy, f. Mellemgaard, úr Klaksvík, og Ásbjørn Viderø úr Havn.

Petra er gift Jóannes Johannesen í Havn. Tey búgva í Hoyvík og eiga børnini Heina (21) og Bjørg (11).



*5. januar 2007 hevði Petra Viderø Johannesen advokatskrivari 30 ára starvsdag hjá Advokatskrivstovuni í Fr. Petersensgøtu*

Stórfingin konsert:

## Súsanna og Rúni Brattaberg í Vestmanna kirkju

Sunnudagin 21. januar kl. 19 verður konsert í Vestmanna kirkju við luttøku av so kendum sangkreftum sum Súsonnu og Rúna Brattaberg. Súsanna syngur mezzosopran og Rúni bass.

Súsanna Brattaberg hevur í tveimum umførum undirvíst Vestmanna Kirkjukóri, og samstarvið teirra millum hevur nú eisini ført til eina konsert.

Til konsertina fer kórið at syngja saman við Súsonnu sum solisti í kantatuni "Christ lag in Todesbanden" eftir J. S. Bach. Eisini fer kórið at syngja saman við Rúna Brattaberg.

Vestmanna kirkja er nýliga umvæld, og umstøðurnar eru sera góðar til konsertir, so spennandi verður at hoyra hesar kendu sangarar.

Tað er Vestmanna kirkja saman við Vestmanna Kirkjukóri, sum skipar fyri hesum tiltaki.



†

### Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Dávur Jóhan Niclassen, Sørvágur**, fer av Landssjúkrahúskapellinum í dag kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju mikudagin kl. 13.00. Tey, ið vilja minnast Dávur Jóhan, kunnu lata eina peningagávu; konta í Eik.

**Mainhard Danielsen, Nes**, vanliga nevndur **Mainhard uppi í Forna**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 6. januar, 88 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum týsdagin 9. januar klokkan 17 heim í Fríðrikskirkjuna. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni mikudagin 10. januar klokkan 13

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði maður, pápi, sonur, beiggi og abbi okkara

**Dávur Jóhan Niclassen**

Sørvágur

andaðist 5. januar 55 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju mikudagin kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*
**Sólgerð, Ann, Heri, Jógvan og John**

Tey, ið vilja minnast Dávur Jóhan, kunnu lata eina peningagávu á konto í Eik

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæri maður, pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Thorbjørn Hermansen**
Tvøroyri

andaðist og varð jarðaður.
Takk til Jónsvein Bech, prest, organist, klokkara, sangarar og berarar.
Takk fyri blómur, kransar, uppringingar og gávu til Tvøroyrar kirkju og til øll, ið fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*
**Oddvør, Herálvur, Sunneva og Finnbjørn**

**Dagurin**
9. januar. Julianus. Búði í Egyptalandi, og varð umleið ár 300 hálshøgdur, tá ið rómverski keisarin Diokletianus legði eftir teimum kristnu.